Skjal 1

almannastovan

Fíggjarmálaráðið
Kvíggjartún 1, Postboks 2039
165 Argir

**Dagur:** 11.02.2011
**J.nr.:** 2008-90100/0192
**(at tilskila í svari)**

**Hoyringsviðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um manntal í 2011**

Fíggjarmálaráðið hevur við telduposti tann 31. januar 2011 sent Almannastovuni omanfyri nevnda uppskot til hoyringar.

Almannastovan hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Í uppskotinum og í viðmerkingunum til uppskotið verður heiti Hagstovan nýtt. Sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya, er heiti á stovninum Hagstova Føroya.

**Til viðmerkingarnar til § 2:**
Í viðmerkingunum verður víst til § 4. Skal hetta ikki verða § 3?

**Til § 3, stk. 2, nr. 3:**
Mælt verður til at allýsa hugtakið "teljináttina" í viðmerkingunum, so ongin ivi er um, hvat hetta merkir.

**Til § 3, stk. 3:**
Sambært hesi áseting skal avvarandi, verji ella onnur svara fyri tey, sum ikki sjálvi kunnu svara spurningunum. Í viðmerkingunum stendur, at foreldur ella onnur kunnu fylla spurnarblaðið út fyri børn og onnur, sum ikki eru før fyri at útfylla spurnarblaðið. Mælt verður til at áseta heilt greitt í greinini ella í viðmerkingunum, hvør hevur skyldu at svara, um ein persónur ikki sjálvur kann/er førur fyri at svara spurningunum. Hetta vísandi til, at tann sum ikki svarar, sambært § 8, stk. 2 kann verða revsaður.

**Til § 8, stk. 2:**
Mælt verður til at gera eina lýsing í viðmerkingunum av, hvat "rættstundis" merkir. Hetta vísandi til, at persónur kann verða revsaður, um hann ikki rættstundis veitir upplýsingar, ið verða kravdar av honum.

Vinarliga

Petra Johnsdóttir Joensen
*stjóri*

/ Birgit Vitalis Ottosen
*ráðgevi*